


LØGTINGSVALIÐ 19. JANUAR 2008

# Smart kanska – men ikki seriøst!



Val X

POUL MICHELSEN
Fólkaflokkurin

**Hóast tingbólkurin var ímóti – atkvøddi Poul Michelsen fyri?**

Jørgin Niclasen fráboðar í tíðindunum í morgun, at hóast tingbólkurin var samdur um at vera ímóti 266b, so atkvøddi Poul Michelsen fyri.

Formaðurin fær tað til at ljóða soleiðis, at tingbólkurin var samdur um hesa niðurstøðu, og at Poul Michelsen bara gjørdi nakað annað enn ein samdur tingbólkur samdist um.

Veruleikin er tann, at flokkurin leingi hevur kent mína støðu til slík etisk mál, og at eg á fundi í tingbólkinum beint undan tingfundinum fráboðaði tingbólkinum mína støðu. Og tí hevur ongantíð verið talan um nakran samdan tingbólk.

Tíverri skuldi eg uttanlands og hevði biðið Anniku Olsen koma inn fyri meg í 10 dagar. Tað skuldi eg ikki havt gjørt, tí við at Annika kom inn, bleiv tingbólkurin samdur.

Eg eri sjálvur framsøgumaður í rættarmálum fyri Fólkaflokkin. Men av tí at eg, sum sagt, skuldi uttanlands, skuldi Jákup Mikkelsen, sum var varamaður mín í rættarnevndini, leggja málið fram í tinginum. Eg hevði tí eitt prát við Jákup um hetta og minti hann á støðu míni.

Hóast hetta, so bleiv – áðrenn eg var komin á flogvøllin - boðað frá av tingsins røðarapalli, at tingbólkurin hjá Fólkaflokkinum var samdur um at vera ímóti 266b.

Líka mikið hvat enn so endamálið við hesi proklamatión var, so kemst ikki uttanum, at talan var um eina smarta – men sera óseriøsa politiska handling. At formaðurin í Fólkaflokkinum nú aftur roynir at endutaka politisku fintuna ger ikki flokkin minni óseriøsan.

Fólkaflokkurin má kennast við seg sjálvan og egnu stevnuskrá. Fólkaflokkurin er ein liberalur flokkur – sum merkir, at borgarin skal hava fult politiskt og búskaparligt frælsi.

Her er ikki talan um eina av og á skipan – antin tryggja vit frælsi hins einstaka ella gera vit tað ikki.

# Studentarskúlin-vandamikil?



Val X

MARJUS DAM
løgtingsmaður

Upplýst var, at bókasavnið á ovastu hædd vigar helst so nógv, at gólvið kann brotna undan tí nær tað skal vera. Um tað hendir í skúlatíðini, so kann tað fáa heilt vanlukkuligar fylgjur.

Nú ein dagin gingu næmingar frá Hoydølum ein túr oman til Løgtingið at gera vart við, at teirra skúli ikki lýkur dagsins standard. Hann er gjørdur at undirvísa góðum 200 næmingum – men har eru uml 600 næmingar.

Sjálvur stuðli eg so hjartaliga, at ein nýggjur Studentarskúli verður bygdur.

Nú er nóg mikið tosað og neyðugt er at fara ígongd við at byggja, so okkara ungdómur fær møguleikar at nema sær kunnleika í hølum, sum tað sømir seg. Seinni fekk ein at síggja við egnum eygum, at hølisviðurskiftini ikki bert eru vánalig, men møguliga eisini hættislig. Tað var t.d. nevnt, at bókasavnið á ovastu hædd helst vigar so nógv, at gólvið kann brotna undan tí. Eg fari við hesum at heita á Mentamálaráðið um at kanna hesi viðurskiftir, so bókasavnið kann flytast, um neyðugt- áðrenn ein vanlukka hendir.

Eftir at hava sæð skúlan kann ein bert geva okkara ungu rætt. Skúlin er í so vánaligum standi, at nýggjur skúli má byggjast sum skjótast.

Vit hava onki annað val.

# Hoydalar politisk skomm



Val X

ÓLUVA KLETTSKARÐ
studentaskúlalærari
Tjóðveldi

Tað er sera hugaligt, at næmingarnir í Hoydølum nú alment hava víst sína ónøgd við skúlan, og alla æru vert, at ung fólk soleiðis siga frá síni ónøgd. Og hetta eru veruligu brúkararnir í skúlanum, ið seta orð á hvussu ófatiliga ússalig støðan er. Vit hava jú hoyrt, at ongi rættindi í sambandi við arbeiðseftirlit fevna um næmingarnar, bert um starvsfólkini. Hetta er púra skilaleyst, og ikki minst rættiliga pínligt at hugsa sær, at einir 500 næmingar als ikki hava nakra trygd um arbeiðskarmar, bara tí tey eru ung fólk.

**The Blame Game**
Nú tað skemtiliga er hent, at politikarar eru farnir at geva lærarunum í Hoydølum skyldina fyri, at ongin loysn er funnin í málinum um skúlan í Hoydølum, so kenna hesir als ikki sína uppgávu. Vita politikarar ikki, at tað eru teir, ið avgera, hvar, hvussu og nær ein skúli skal byggjast? Álvaratos, vita teir ikki, at teir hava bjóðað seg fram til at taka avgerðir, um tær eru populerar ella ikki? Teir kunnu velja at lurta eftir avvarðandi fólki, í hesum føri lærarum og/ella leiðslu á staðnum, og taka hesar hugsanir við, tá málið skal avgerast. Ella teir kunnu bara lata vera - annað er ikki í hesum máli. Um politikarar lata slíkt mál fella aftur á lærararnar, so er tað í ryggloysi og dugnaloysi, onki annað. At geva øðrum skyldina og vaska sínar hendur, tað er at leggja handklæðið í ringin.

**Skúli er arbeiðspláss**
Almennu Føroyar eiga í stundini at taka skúla og ung fólk í álvara og virða bæði børn og ung. Og politikarar, kommunalpolitikarar eins og landspolitikarar, skulu fata, at skúli er eitt starvsstað, tað er ikki bara ein kassi, har tú stappar børn og ung inn um dagin, meðan foreldrini eru til arbeiðis. Nei, skúli er eitt arbeiðspláss, kanska tað týdningarmesta arbeiðsplássið, ið er, tí her verða allir lunnar lagdir undir nútíðar- og framtíðarætlanir Føroya.

**Nýggjan skúla ongantíð ov skjótt**
Eftir at hava starvast í Hoydølum í sjey ár, so veit eg, at standurin er veruliga so ringur, sum tey ungu vísa á, ja kanska verri. Tí tað er í veruleikanum ilt at síggja, hvussu óarbeiðsligt eitt inniumhvørvi ella ein skúli er. Og hóast lærararnir royna hvønn dag, sum Kári Mortensen í skilagóðari grein vísti á, so er skúlin bara fullkomuliga óegnaður til dagligt. At næmingarnir fáa góð úrslit er bara lærarunum fyri at takka; tí inni í skúlanum er alt ov lítið, ov trongt, ov heitt og bara óegnað. Og bara so óinspirerandi. So onki annað er at gera enn at játta nýggjan skúla í stundini.

**Ungdómurin er íløga**
Tað er ikki ilt at gita, hvat ein reiðari mundi gjørt, um hann kom til hasa niðurstøðuna um skip sítt. Men politikararnir geva lærarunum skyldina, seta niður nevndir, gera uppskot, tosa ella gera teir als onki.

Vit mugu fata, at skúli og ungdómur eru ikki útreiðslur, men íløgur. Og hesar íløgur hava vit ikki ráð at lata vera við at invistera í, so einfalt er tað.

# Supermyllan úr Nólsoy

KÁRI THOMSEN
cand.arch.



Bjarti Thomsen hevur grein í Dimmalætting har hann vísir til at vit fyribils eiga at halda aftur við EL-kaðali úr Íslandi inntil stungið er út í kortið, hvussu vind – og vatnorka skulu útbyggjast og samankoyrast til nøktan av øllum orkutørvinum til upphiting og ravmagn.

Bjarti skjýtur upp at vit byggja verðsins stórstu myllu á Sumbiarstein og so fyribils gloyma íslandskaðalin, og vísir annars í grein síni til ráðgeving landstýrisins, Jarðfeingið, ið í samrøðu við Vinnuvitan rør uppundir at føroyingar tá kunnu seta alla tað vindorku upp okkum lystir.

Rætt er, sum Bjarti vísir til, at Vinnuvitan her átti at sett spurnartekin við dreymasjón Bjarna Djurholms, landstýrsimanni í orkumálum.

Tó fer Bjarti Thomsen heldur lætt um álvarsmálini, Kyoto og so nøktan av framtíðar orkutørvinum. Eingin ivi er at Íslandskaðalin skal tæna fjálturstungna landsstýrismanninum nú valið nærkast í stórum, men at vit fyribils skulu steðga við Íslandskaðalinum, kann tykjast undarligt tá slíkur kann slitna eina viku ella 5 ár ella 15 ár eftir at hann er lagdur.

Bjarti rør uppundir at vit kunnu nøkta allan tørv til upphiting og ravmagn við vindorku og vatnorku. Bjarti sigur seg vera sivilverkfrøðing, er vist eisini í almennum føstum starvi, og fær harafturat hundraðtúsund kónur til eitthvørt arbeiði við megaverkætlan hjá sama landsstýrsimanni. Sum Bjarti sigur er gott at onkur hevur beinini á jørðini og fatur í rætta endanum, og sipar hann her til nýggja SEV stjóran, ið ikki enn er komin í nýggja starvið og tí sjálvandi ikki er so áhugaður í stórvegis útgreiningum. At sjónvarpsverturin er dugnaligur er so ikki at taka aftur.

Tá Bjarti, sum gott er, leggur seg út í kjakið um Kyoto og orkupolitikk, kann eftirlýsast eitt meira ítøkiligt ella konstruktiv og uppbyggjandi íkast , heldur enn at missa sambandið við jørðina og tosa um verðsins stórstu myllu á Sumbiarsteini. Ein slík mylla kann so á ongan hátt framleiða allan okkara orkutørv, og harafturat finnast fleiri aðrir møguleikar enn bert vindorka og vatnorka.

Fyri at stuðla undir Bjarta Thomsen, og fáa hann longur inn í Kyotoog orkukjakið, so kann upplýsast at okkara oljubrúk til upphiting og ravmagn er góð 94.000 tons av olju. Umroknað til ravmagn, og uttan at hugsa um nýtslustig til framleiðslu av heitum vatni, so svarar tað til 1.090 mill.KWtímar. Hetta er 4 ferðir okkara samlaðu ravmagnsframleiðslu. Um vindorka alleina skal nøkta henda tørv og vit t.d. brúka 2MW myllur, so skulu "einans" setast upp 125 myllur. Kostnaður: 2.milla.kr.

Her er ikki tikin hædd fyri sparing í orkubrúkið, betur bjálving, hitapumpur, EL-sparitól, sólorka, alduroka, sjóðarfallsorka, avlopsorka frá ov nógvum vatni á vetrartíð, pumping og endurnýtsla av vatnorku, osmosa, o.a.

Hvar vil Bjarti Thomsen hava allar hesar myllur settar upp? Hvar er landsplanleggingin?

At Sumbiarsteinur kann nýtast til eina vindmyllu er púra rætt, men økið úr Akrabergi til Sumbiarstein/ Flesjanar er um 9km2 stórt og við dýbd millum 13 og 36 metrar, ið er sera væl hóskandi til offshore myllur.Her kunnu setast einar 130 myllur upp, men er nokk ynskiligt at spjaða tær nakað yvir landið – og so sjálvandi eisini nýta aðrar orkukeldur m.a. sjóðarfallsorkuna, ið gevur líka so dygdargott ravmagn sum vatnorkan.

Sóknast verður eftir áhaldandi og ítøkiligum íkasti frá Bjarta Thomsen til hvussu vit loysa Kyototrupulleikan og orkutørvin – heimsins stórstu vindmyllu má hann ikki rokna við sum royndarprojekt á okkara leið.